

## RÆTTA TÍÐ

*- Eg royni at vera her í Oyndarfirði, tá Eivind letur upp klokkan 9. Men skal eg til Gjáar fyrst, kann klokkan lættliga blíva 10, sigur Niels Jacob Heinesen, bilførari hjá PM Heilsøluni*

**» Eg royni síðani at fara frá húsum, soleiðis at eg eri hjá PM Heilsøluni, tá klokkan er umleið hálvgum fýra - altso um morgunin**

## HUGALIGT

*Hóast Niels Jacob Heinesen hevur eina langa rutu hvønn einasta dag, er altíð tíð til eitt stutt prát, tá hann kemur við vørunum til Eivind Petersen í Oyndarfirði. Onkutíð fær hann eisini heilsað uppá ein kunda, í hesum føri Sigmund Rasmussen*

# Klokkan 3:00

Hjá Niels Jacob Heinesen og fyritøku hansara er tað av størsta týdningi, at vøran kemur út til kundan eftir fastari skipan.

Fyri at røkka øllum handlunum á rutuni er neyðugt at fara árla til verka, - so árla, at vekkari hansara longu ringir klokkan 3 um morgunin.

- Eg royni síðani at fara frá húsum, soleiðis at eg eri hjá PM Heilsøluni, tá klokkan er umleið hálvgum fýra - altso um morgunin, leggur Niels Jacob brosandi aftrat.

Tá fer hann beinanvegin undir at fylla stóra vørubilin við tí, sum skal koyrast út henda dagin. Hetta arbeiðið skal skipast væl, soleiðis at tann vøran sum skal til tann fyrsta handilin fer seinast inn.

- Eg royni tí at fara úr Havnini áðrenn klokkan 5, soleiðis at eg kann vera her í Oyndarfirði klokkan 9, tá Eivind letur upp, sigur Niels Jacob.